# Kjak



**Bjørn Kalsø**
*løgtingsmaður*

# Byggja út á Tekniska Skúlanum í Klaksvík

*Nú verðu farið undir tiltrongdar útbyggingar á Tekniska Skúlanum í Klaksvík. Í álitinum til fíggjarlógina frá fíggjarnevndini varð skotið upp at seta 5 mió. kr. av til endamálið í 2011. Uppskotið varð samtykt við stórum meiriluta á Løgtingi*

Í álitinum frá fíggjarnevndin stendur m.a.:

*"Farið verður undir víðari útbyggingar á Tekniska skúlanum í Klaksvík, sum skulu loysa framtíðar hølistørvin á miðnáms-, yrkis-, og maritima skúlaøkinum í Norðoyggjum.*

*Skúladepilin, ið verður mentur, skal hýsa verandi útbúgvingartilboðum, nýggju matvøruútbúgvingunum og komandi maritima deplinum.*

*Undir fyrireikingunum til útbyggingarnar eigur dentur at verða lagdur á at nøkta verandi tørv, umframt at hava í huga framtíðar møguleikar at fara undir nýggjar viðkomandi útbúgvingar, bæði á miðnámsstøði, og innan hægri lestur.*

*Fyrireikingarnar skulu gerast fyrst í árinum, soleiðis at farast kann undir útbyggingarnar longu á heysti í 2011".*

At fjølbroyttir viðkomandi lestrarmøguleikar verða mentir, er avgerandi amboð í royndini at fáa ungdómar og útbúgvið fólk at støðast í Føroyum.

Í øðrum londum verður dentur lagdur á at spjaða útbúgvingartilboðini kring landið. Dømi um hetta eru í flestu grannalondum okkara, har býir uttan fyri miðstaðarøkið eru týðandi útbúgvingarstøð. Endamálið við hesi mannagongd er at tryggja neyðugu útbúgvingartilboðini, sumstundis sum øki í landinum verða ment.

Vónandi fer feskasta samtyktin á Løgtingi, har peningurin er settur av til útbyggingar á Tekniska Skúlanum í Klaksvík, at verður startskotið í royndini at menna Klaksvíkina, sum er fiskivinnubýur burturav, til eisini at verða útbúgvingarbý við fjølbroyttum starvs- og lestrartilboðum á øllum útbúgvingarstigum, eisini innan hægri lestur.

Grundarlagið at byggja víðari á er til staðar við verandi Tekniska Skúla, HF-skeiði, nýggju matvøruútbúgvingini, Húsarhaldsskúlanum, víðkaðu skipara- og maskinistútbúgvingunum, nýggju Trygdarmiðstøðini, o.ø.

---



**Jóhan Heri Joensen**

# Ellisheimsfløkjan í Eysturoynni

Tíðina upp undir jól hevur Rósa Samuelsen javnan staðið í andglettinum, álopini hava verið nógv, og onkrar av skolunum eru eisini av órøttum oystar yvir hana.

At sita í hennara politiska stóli er heldur ikki lætt, tá ið sparast skal, tí líka mikið hvørja avgerð hon tekur, so verða sjálvt tær røttu avgerðirnar tulkaðar sum skeivar. Tí onkur má merkja niðurskurðin.

Ofta verður av kommunalpolitikarum funnist at ógreiða býtinum millum land og kommunu á eldraøkinum. Hesum taki eg fult undir við og haldi eisini, at tíð er upp á at fáa hesar fløkjur greiddar, men satt at siga so skilji eg ikki atfinningina hjá kommununum í Eysturoynni móti flytingini av røktarplássunum úr kjallaranum í Gøtubrá.

**Einki pláss verður niðurlagt – tað verður bert ruddað upp í ábyrgdarfløkjuni.**

At gera fløkjuna av tí almenna/kommunala enn meira fløkt er Gøtubrá eitt fekst dømi uppá.

Hví skal kjallarin í Gøtubrá nýtast sum eitt sminkað Ellisheim við sersømdum?

Hini eldrasambýlini/umlætingarheimini verða **– tíverri - eisini nýtt sum Ellisheim** – uttan nakrar sersømdir. Sum verja móti hesi broyting verður grundgivið við, at 100 fólk standa á bíðilista til Røktarheim. Er tað veruliga so galið, at framtíðarpolitikkurin er at loysa trupulleikan, við pjøssaloysnum, í ymsum kjallarum???? Nei, trupulleikin fer bara at vaksa sum árini ganga – veruliga loysnin er eitt Ellisheim afturat í Eysturoynni. Norðurstreymoy og Vágar eru normeraðar við trimum ellisheimum, so tað er avgjørt upp á sítt pláss, at tvey eru fyri Eysturoynna. Fuglafjørður hevur tíverri slept tí ætlan, sum løgd varð á hesum øki, men onkur onnur kommuna má verða so mikið at sær komin at kunna taka við, har slept er.

Í veruleikanum tosa komunalpolittikararnir í Eysturoynni við tveimum tungum.

Kravt verður eitt greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunu, samstundis sum teir sjálvir framleiða fløkjur í hinum endanum. Hetta má kallast politiskt skemt á høgum støði.

Nei, - nýtið Ellisheimini til ellisheim og eldrasambýlini til tað, tey eru bygd til.

### Rósa!

Sum fyrrverandi býráðspolitikari í Fuglafirði, við ábyrgd av eldraøkinum, og stýrislimur í Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í 8 ár, vil eg stuðla tær í tíni avgerð. Tín strategi í Eysturoynni er røtt, ein byrjan upp á at loysa fløkjuna av ábyrgdarbýtinum. Hetta er byrjanin – halt síðani áfram við sama treysti!



**Bjørt Samuelsen**
*løgtingskvinna*

# Fíggjarlógin varð ikki einmælt samtykt

"Fíggjarlógin varð einmælt samtykt beint undan jólum", og "... fyri einaferð skyld var semja um okkurt í Løgtinginum", skrivar Dimma í leiðara.

Hetta er ikki so. Hóskvøldið hin 22. desember varð fíggjarlógin fyri 2011, við metferð samtykt av einum stórum meiriluta. Men, hon var ikki einmælt samtykt.

Vit vóru nøkur, sum hvørki vildu ella kundu trýsta á grøna knøttin fyri einari fíggjarlóg, hvørs endaliga skap vit einans kendu í leysum brotum. Hvørs avleiðingar, vit ikki høvdu stundir at viðgera, og hvørs samlaðu broytingar vit einans fingu eitt korter at seta okkum inn í!

Dugi ikki á nakran hátt at síggja, hvussu tað kann forsvarast, at landsins fíggjarlóg, sum røkkur inn í hvørt einasta heim í Føroyum og út á hvørt einasta arbeiðspláss, soleiðis verður skrumblað ígjøgnum. At vit fólkavaldu skuldu kunna halda frí millum jól og nýggjár, er sjálvandi ikki ein grundgeving yvirhøvur.

### Ikki vita, einki siga

Tað ber til at gleðast um summar av broytingunum og raðfestingunum, sum fíggjarnevndin loksins samdist um. Men har vórðu eisini gjørd ógvuslig høgg, eitt nú á almannaøkinum, har konta til bústovnar varð skorin við tvísiffraðari milliónaupphædd. Og heldur ikki hetta varð viðgjørt ella kjakast um í tingsalinum. Tí orðaskiftið varð einki.

Álitið frá fíggjarnevndini varð lagt fram hóskvøldið og skamma stund seinni, varð uppskotið við broytingum samtykt. Hetta hóast tingformaðurin hevði ásett, at 2. viðgerð av fíggjarlógini ikki skuldi verða fyrr enn 28. desember. Men ein meiriluti samtykti at víkjast skuldi frá øllum tíðarfreistum. Tí kundi 2. viðgerð byrja so stutt eftir, at álitið varð framlagt, og 3. viðgerð beint eftir hetta.

Tinglimir høvdu ongan heiðurligan møguleika at gjøgnumganga og seriøst viðgera mongu fesku umraðfestingarnar hjá fíggjarnevndini. Og fólkaræðisins sonevndi varðhundur, pressan, fyri ikki at tala um fólkið sjálvt, enn minni møguleika at vita nakað sum helst.

### Reglur til pynt

Tíverri staðfesti fíggjarlógarviðgerðin tað, sum er vorðið reglan heldur enn undantakið: Tess størri og týdningarmeiri eitt mál er, tess minni viðgerð fær tað í Løgtinginum. Hví eru yvirhøvur ásetingar um tíðarfreistir, um floytað verður á hesar í flestu stórmálum?

Saman við einum lítlum minniluta atkvøddi undirritaða ímóti uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2011. Tað munti sum hjá Snopprikki. Og fólkaræðið fekk enn ein dyggan undir vangan.